# Vestergaard er framvegis í bíðistøðu

**– Eg haldi ikki, at ES tilætlað dregur fundardagin út. Tað er meiri skipanin í felagsskapinum, ið er stór og stirvin, sigur Jacob Vestergaard, ið heldur, at hugsandi er, at ein fundur verður við fiskivinnukommiserin í ES tíðliga í juli mánaði**

Vilmund Jacobsen

Enn er eingin endaligur dagur ásettur, nær landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard, sleppur á fund at hitta fiskivinnukommiserin í ES í sambandi við makrelmálið.

Landsstýrismaðurin hevur annars verið á fundi við íslendska og norska fiskimálaráðharran um spurningin, men enn vantar fundurin, sum ætlandi skal verða við fiskivinnukommiserin í ES.

### Samband er

Jacob Vestergaard sigur í morgun, at samband hevur verið millum Fiskimálaráðið og ES um spurningin.

– Møguligir fundardagar hava verið nevndir, men enn er einki endaliga avtalað.

Landsstýrismaðurin sigur, at ein dagur sum 5. juli hevur verið nevndur sum ein møguleiki, men næstu dagarnar verður greitt, um hetta verður dagurin – ella, um fundardagurin verður ein annar.

Jacob Vestergaard ásannar, at tíðin er ikki við okkum, sær Føroyar skulu áseta sær egna makrelkvotu fyri 2010, nú strandalondini ikki kundu semjast um býtið av felagskvotuni á seinasta fundi, sum var í London fyrr í summar.

Føroyar vilja ikki góðtaka, at parturin hjá okkum framhaldandi verður minni enn 5% av felagskvotuni, meðan Noreg og ES kanna sær alla restina.

Kravið hjá Føroyum í samráðingunum við hini strandalondini hevur verið í minsta lagi 15%, men tað er einki, sum bendir á, at Noreg og ES yvirhøvur vilja økja føroyska partin nakað sum helst.

At politiskir fundir nú hava verið millum partarnar, og slíkur fundur eisini skal verða við fiskivinnukommiserin í ES, er ein avtala, sum er komin í lag, eftir at Jacob Vestergaard fyri eini tíð síðan var á fundi í uttanlandsnevndini at umrøða støðuna í makrelspurninginum.

Nú samráðingarnar millum strandalondini slitnaðu, hevur Jacob Vestergaard ætlað at tillutað Føroyum eina eginkvotu av makreli upp á 150.000 tons, men politiska baklandið í Føroyum ynskti, at viðurskiftini fyrst verða tikin upp á politiskum støði millum partarnar, sum varða av makrelinum.

### Ikki tilætlað

Tað er hetta arbeiði, sum nú er í gongd, og enn restar fundurin, sum fiskimálaráðharrin skal hava við fiskivinnukommiserin í ES um málið.

Sjálvur ásannar Jacob Vestergaard, at ES er eitt størri "apparat", og tí er tað ikki bara sum at siga tað at fáa ein slíkan fund í lag.

– Men eg haldi ikki, at ES tilætlað dregur fundardagin út. Tað er meiri skipanin í felagsskapinum, ið er stór og stirvin, leggur landsstýrismaðurin aftrat.

vilmund@sosialurin.fo

> **... møguligir fundardagar hava verið nevndir, men enn er einki endaliga avtalað...**
>
> JACOB VESTERGAARD


BÍÐISTØÐA

*– ES er eitt størri "apparat", og tí er tað ikki bara sum at siga tað at fáa ein slíkan fund í lag, sigur Jacob Vestergaard*




*Hallstein Sigurðsson, sum hevur starvast á Prentmiðstøðini við útbering og Eyðun Húsgarð, stjóri á Prentmiðstøðini*

# Posta yvirtekur alla útbering hjá Prentmiðstøðini

**– Vit eru keddir um at skula siga so mongum fólkum úr starvi, men við verandi grundarlagi fæst ikki samanhangur í útberingina, sigur Árni Ellefsen, nevndarformaður í Prentmiðstøðini**

Vilmund Jacobsen

Í tíðindaskrivi í morgun boðar nevndarformaðurin í Prentmiðstøðini, Árni Ellefsen, frá, at felagið gevst við allari útbering av bløðum og reklamulutum frá í dag at rokna.

– Orsøkin er, at hetta virksemið hevur givið hall, og mett verður ikki, at útlit eru til, at virksemið fer at geva avlop aftur, soleiðis sum marknaðurin hevur lagað seg.

Nevndarformaðurin sigur við Sosialin í morgun, at við teimum nøgdum og prísum, sum hava verið í seinastuni, er ikki grundarlag fyri framhaldi av hesum virksemi.

### Nógvar uppsagnir

Øll starvsfólkini á Prentmiðstøðini, sum hava fingist við hesa tænastu hjá felagnum, eru søgd úr starvi, samstundis sum Posta teku yvir tær avtalur um útbering, sum Prentmiðstøðin hevur havt.

Árni Ellefsen sigur við Sosialin, at umleið 300 fólk hava verið knýtt at útberingarvirkseminum hjá Prentmiðstøðini.

– Flestu av hesum eru ungfólk kring um landið, sum hava tikið sær av útberingini hjá felagnum. Haraftrat koma so tey fýra fólkini, sum hava starvast á Prentmiðstøðini við hesum virksemi.

Nevndarformaðurin sigur, at tað sjálvandi er keðiligt at skula siga so mongum fólkum úr starvi, men tá raksturin ikki fæst at hanga saman á verandi grundarlagi, og útlit ikki eru til, at hesi viðurskifti fara at broytast, er neyðugt at taka hetta stig.

Hann sigur, at øll, sum hava starvast við útbering hjá Prentmiðstøðini, eru leys úr hesum arbeiði frá í dag at rokna.

### Út um somu tíð

Bera, ið er navnið, sum Prentmiðstøðin hevur brúkt í samband við hesa útberingartænastu, hevur eitt nú borið Dimmalætting út, meðan Posta síðan einaferð í fjør heyst hevur syrgt fyri útberingini av Sosialinum.

Spurdur, um Dimmalætting og Sosialurin hugsandi verða borin út til haldararnar samstundis, nú Posta yvirtekur hesa tænastu, sigur Árni Ellefsen, at tað væntar hann.

– Hvussu Posta annars fer at skipa tænastuna við útbering av Dimmalætting, verður ein avtala millum Posta og Dimmalætting, leggur nevndarformaðurin aftrat.

Meðan Sosialurin nú kemur út tríggjar ferðir um vikuna, kemur Dimmalætting framvegis út fimm ferðir um vikuna.

vilmund@sosialurin.fo

> **... tað er sjálvandi keðiligt at skula siga so mongum fólkum úr starvi...**
>
> ÁRNI ELLEFSEN